# SHEFA verpir gullegg til Føroyar

**Føroyski KT og samskiftisrisin, Føroya Tele er við at byggja sær upp nýggjar marknaðir uttan fyri landoddarnar. Fyritøkan hevur gjørt avtalu við bretska oljurisan BP og bretska samskiftisrisan BT um at veita ávikavist oljupallunum vestan fyri Hetland og oyggjabúgvunum í Orknoyggjum og Hetlandi týðandi tænastur. Nú gongur leiðin víðari út í Norðsjógvin**

SAMSKIFTIS VERKÆTLAN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hóast mong myrk skýggj í alheimsbúskapinum, sum nú eisini røkka okkara leiðum, so eru kortini ljósglottar at hóma. Í farnu viku skrivaðu vit um føroysku alivinnuna, sum hevur vind í seglunum. Og her á landi er enn ein vinna, sum hevur viðrák. Tað er stóra Shefakaðals-verkætlanin hjá Føroya Tele, sum hevur verið í stoypiskeiðini nú í nøkur ár. Talan er um eina risaætlan eftir føroyskum viðurskiftnum – og um eina ætlan, sum setur út í kortið heilt av nýggjum.

Sjálvur Shefakaðalin varð tikin í nýtslu fyrr í ár. Hann skal tryggja telesamskiftið millum Føroyar og umheimin. Men hann kann so nógv meira eisini. Eitt nú kann hann veita eini av heimsins størstu fyritøkum, oljufelagnum BP eina spildurnýggja tænastu.

### Klók høvd

Tá Shefaverkætlanin var komin nakað ávegis vóru tað klók høvd hjá FT Net og Føroya Tele, sum sóu ein heilt nýggjan møguleika at fáa nakrar eyka"gevinstir" burtur úr hesum framkomna samskiftiskaðali. Hví ikki fáa oljuleiðir vestan fyri Hetland at knýta seg uppí Shefa og harvið fáa atgongd til eitt nógv meira trygt og bíligari samskiftislið enn at brúka fylgissveinasamskifti, sum kann vera bæði svikaligt og dýrt!

Hetta endaði við, at føroyski Dávid og bretski Goliat settu seg við tekniborðið, og úrslitið hava vit í dag. Eftir at hava lagt ein ískoytiskaðal millum høvuðskaðalin og tær báðar oljuleiðirnar Schiehallion og Clair, hevur Føroya Tele gjørt eina langtíðar avtalu, sum ber í sær, at BP keypir samband við høgum kapasiteti.

### Knýta uppí høvuðskaðal

Fyrr í ár vóru ávikavist framleiðsluskipið á Schiehallion-oljufeltinum og oljupallurin Clair knýtt uppí høvuðskaðalin, sum gongur millum Hetland og Føroyar. Síðani hevur sambandið verið royndarkoyrt, og nú koyrir tað bara. Kristian Davidsen, stjóri á Føroya Tele og Páll Vesturbú, stjóri í FT Net eru sera fegnir og lættir um hjartað, nú teir eru komnir gjøgnum nálareygað, og BP leiðslan hevur góðtikið verkætlanina. Tað er nevniliga ikki bara sum at siga tað at koma ígjøgnum við nýggjum verkætlanum við eitt stórt oljufelag. Har eru mannagongdirnar sera tungar, ikki minst tá hetta eisini hevur nakað við trygdina at gera. Ikki fyrr enn alt er royndarkoyrt og víst seg at rigga hevur BP givið Føroya Tele grønt ljós at fara út til almenningin við hesum fyri Føroyar stórtíðindum. At hava fingið slíka góðkenning merkir eisini, at nú er vegurin opin fyri Føroya Tele at fara út á heimsmarknaðin við eini vøru, sum er roynd og góðtikin av einum av heimsins størstu oljufeløgum. Samanumtikið nógvir fulltreffarar og góð tíðindi fyri føroyskt vinnulív.

### Gagnar eisini brúkarum her

Tað er nevniliga ikki bara fyri Føroya Tele, at hetta eru góð tíðindi. Fyri brúkararnar av eitt nú breiðbandinum hjá Føroya Tele, sum er tryggjað nógv størri orku gjøgnum Shefa, kann hetta eisini vera eitt frambrot, soleiðis at skilja, at sáttmálin við BP kann koma at gera aðrar tænastur hjá føroyskum brúkarum bíligari í framtíðini, nú fleiri eru um at rinda fyri raksturin, umframt sjálva íløguna.

Men henda fyrsta sveinaroyndin á hesum nýggja forrætningsøkinum hjá Føroya Tele kann eisini fara at seta aðrar ringar í sjógvin. Longu nú eru samráðingar við onnur oljufeløg um at fremja líknandi KT- og samskiftisloysnir. Sjálvandi verður hugt at møguleikum millum Føroyar og Hetland, men í løtuni sær tað serstakliga spennandi út í Norðsjónum. Har er oljufelag, sum hevur víst hesi nýggju heildarloysnini áhuga. Páll Vesturbú sigur við Sosialin, at teir hava møguleika at leggja út ískoytiskaðalar frá Shefastøðunum á landi í antin Hetlandi ella Orknoyggjum. Sjálvur Shefakaðalin gongur úr Skotlandi til Orknoyggjar og Hetland og so víðari til Føroya.

### FT fremur oyggjamenning

Enn ein gimsteinur er í Shefakrúnini. Hann er nýggja sambandið, sum oyggjabúgvarnir í Orknoyggjum og Hetlandi hava fingið, nú Shefa gongur um teirra oyggjar. Avtala er gjørd við bretsku samskiftisfyritøkuna, BT um at selja kapasitet til hesi oyggjasamfeløgini. Ein uppgáva, sum risastóra BT ikki hevur megnað nóg væl. Við øðrum orðum er føroyski KT- og samskiftisdvørgurin, í hvussu er í altjóða høpi,




*Shefakaðalin gongur úr Skotlandi til Føroya. Á leiðini gongur hann inn í Orknoyggjum og Hetlandi umframt at ískoytiskaðalar eru lagdir út til oljuleiðirnar vestan fyri Hetland, ávikavist Schiehallion og Clair*



*Kristian Davidsen, stjóri á Føroya Tele og Páll Vesturbú, stjóri í FT Net við kortinum av Shefa og útbyggingunum*

*Mynd Jan Müller*